## Fyri handverkarar sum arbeiða við hydraulik

Treytað av m.a. nóg stórari undirtøku, verður skeið hildið í arbeiði við hydraulik tann 12. til 16. juni 2000.

| | |
|---|---|
| Innihald: | Fysiskt grundarlag (Pascvals lóg, SI eindir, symbolir) ventilar, pumpur, motorar, útrokningar, monogrammir. Stýrimaskinur, spøl, fjarstýringar, síðuskrúvur, gravimaskinur. Drift órógv |
| Luttakaragjald: | kr. 4.500,00 |
| Tilmelding: | **áðrenn 8. juni 2000** |
| Skeiðleiðari: | Kári Johannesen, KJ-Hydraulik og Helgi Mortensen, Tekniski Skúlin í Tórshavn |

Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tlf. 311957 (mánadag–fríggjadag kl. 8–12 & 13–16).

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75 • Boks 239
FO-110 Tórshavn • Fax 316621

## Til sølu



Um hóskandi boð fæst, er ognin á matr. nr. 774 í Niels Finsensgøtu 40 í Tórshavn til sølu.

Grundøkið er 260 fermetrar. Húsini eru í trimum hæddum við tilbygningi, ið er væl hóskandi til goymslu ella annað. Samlaða gólvvíddin er 224 fermetrar.

Áhugað kunnu síggja húsini mikudagin 31/5 kl. 14–18.

**Fartlf. 217510 ella tlf. 311590,**
eftir kl. 18

## Skrivstovufólk / goymslufólk

**Til brandstøðina hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir skrivstovu/-goymslufólki.**

**Høvuðsuppgávur**
Nakrar av høvuðsuppgávunum hjá skrivstovu/-goymslufólkinum verða at:

- skriva rokningar
- gera ymiskar skrivstovuuppgávur
- umsita goymsluna
- skráseta føraraábyrgdir
- skráseta skorsteinar og brandpostar
- fakturera og bóka (Navision)
- avgreiða tollpappír, bankaflytingar o.a.
- gera ymiskar varðsstovuuppgávur

**Førleikakrøv**
Neyðugt er, at umsøkjarin er útbúgvin innan skrivstovuyrkið og hevur neyðugan førleika við edv á brúkarastøði.

Umframt at tann ið verður settur í starvið, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt, so skal viðkomandi eisini hava góð samstarvsevni og duga væl at samskifta við viðskiftafólk. Harumframt skal starvssetti verða við til at menna tænastustøðið á brandstøðini.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður lønt eftir sáttmálanum millum TKST og Tórshavnar kommunu.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Peter Seloy, støðleiðara, tlf 314881, ella Símun Jákup Hansen, verkstaðleiðari tlf. 319243.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórhavn, í hendi í seinasta lagi 13. juni 2000.

## Leiðari

**Søkt verður eftir leiðara til gøtuljósdeildina hjá Tórshavnar kommunu.**

**Starvsøkið**
Starvið fevnir um at leiða og skipa fyri øllum virksemi hjá gøtuljósdeildini og at hava ábyrgdina av teknisku el-installatiónunum, herundir ferðsluljósunum.

**Førleikakrøv**
Tann, ið settur verður í starv, skal vera góðkendur el-installatørur og hava royndir í el-fakinum.

Neyðugt er, at viðkomandi dugir at samstarva og samskifta við aðrar deildir, stovnar og borgarar.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður at seta skjótast til ber og verður lønt sambært sáttmála millum Tórshavnar kommunala starvs- og tænastumannafelag og Tórshavnar kommunu.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Viggo Christiansen, deildarleiðara, ella Boða Haraldson, býarverkfrøðing, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 13. juni 2000. Merk umsóknina "Leiðari"

Tórshavnar kommuna



## Samskipari til dátusavnið og goymsluna á Jarðfrøðisavninum

Á jarðfrøðisavninum er starv leyst at søkja til setan 1. september 2000. Starvið er tíðaravmarkað í 2 ár.

Starvið fatar um at samskipa:
- dagliga arbeiðið við jarðfrøðiligu søvnunum, herundir skráseting av innkomandi jarðfrøðiligum tilfari
- menningina av søvnunum
- samstarvið innanhýsis og úteftir um dáta og søvn

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar við kunnleika og starvsligum royndum við skipan av jarðfrøðiligum dátum og goymslum hava fyrimun. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava hollan førleika á KT-økinum.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett eftir avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. verður send Jarðfrøðisavninum, Brekkutún 1, Postrúm 3169, FO-188 Hoyvík í seinasta lagi 1. juli 2000.

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
Vinnu- og Miðnámsskúladeildin

## Stakgreinalesandi á students-/HF-stigi

Tey, ið ætla sær at søkja um upptøku sum stakgreinalesandi í einari ella fleiri lærugrein/um á students-/HF-stigi verða biðin um at venda sær til studentaskúlan/HF-skeiðið, har ætlanin er at søkja um upptøku. Umsóknarblað um upptøku fæst frá skúlanum/skeiðnum.

Gjørt verður vart við, at umsøkjarar verða tiknir inn, í tann mun pláss er í teimum ymsu lærugreinunum.

Sambært Kunngerð um ávís gjøld frá 3. apríl 1998 skulu stakgreinalesandi rinda 300 kr fyri hvørja lærugrein, viðkomandi innskrivar seg til undirvísing í.

Seinasta freist at søkja um upptøku er 25. juni 2000.

**Tórshavn 26. mai 2000**

Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.



**Landssjúkrahúsið**
**FO-100 Tórshavn**

## Yvirsjúkrasystrar

**Nú avgerð er tikin um bygnaðin á Landssjúkrahúsinum verða við hesum 3 nýuppræettaði størv sum yvirsjúkrasystrar lýst leys til setan sum skjótast aftaná at umsóknarfreistin er úti eftir nærri avtalu.**

**Felags fyri størvini:**
**Arbeiðsøki:**
Yvirsjúkrasystirin skal saman við leiðandi yvirlækna fyri øll starvsfólk, sum eru sett á deildini:
- Standa fyri starvsfólkaleiðslu og menning
- Seta mál fyri virkseminum á deildini
- Planleggja, samskipa og stýra arbeiðsgongdum, arbeiðstilrættaleggjan og tilfeingisnýtslu, soleiðis at veitt verður so munadygg tænasta til brúkararnar sum gjørligt, innanfyri teir til eina og hvørja tíð galdandi fíggjarkarmar
- Tryggja internt og eksternt samstarv og samskifti
- Tryggja neyðuga fakliga menning

**Førleikakrøv:**
Sjúkrasystraútbúgving og danska góðkenning.
Víðariútbúgving/eftirútbúgving innan sjúkrarøkt.
Útbúgving/royndir innan leiðslu og fyrisiting, helst á fleiri økjum innan sjúkrahús.
Kliniskar royndir innan avv. øki.
Hava góð leiðslu- og samstarvsevni.
Hava góð analytisk evni og vera framskygd/ur.
Vera sinnað/ur til framhaldandi at menna sín leiðsluførleika.
Hava hug og evni at starvast í eini deildarleiðslu, sum byggir á at avgerðir verða tiknar í samstarvsanda.

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Setanarmyndugleiki er sjúkrahúsleiðslan.
Næsti fyrisetti er leiðandi yvirlækni á deildini, tó í sjúkrarøktarfakligum spurningum sjúkrarøktarstjórin.
Starvið er áramálssett í 6 ár og kann leingjast eftir umsókn.
Setanin verður framd sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

**Um deildirnar:**
**Skurðdeildin er:** Læknagongin, t.e. yvirlæknar, yngri læknar, skrivarar v.m., deildirnar: B5, A3, A2 harundir ljósmøður, Skurðgongin v. skaðastovuni, Endoscopideildin, Kirurgisk, Gynækologisk og Obstetrisk ambulatorium.

**Heiliráðdeildin er:** Læknagongin, t.e. yvirlæknar, yngri læknar, kostráðgevi, skrivarar v.m., deildirnar: B7, B6, B4, E2/E3, T.B. støðin, Onkologiskt ambulatorium, Diabetes Ambulatoriið.

**Psykiatrisk deild er:** Læknagongin, t.e. yvirlæknar, yngri læknar, skrivarar v.m., deildirnar: D1, D2, D3, D4, D5, D6, D7, Ambulatoriið, Bóndaheygur.

Tá skipanin er farin at virka, kann talan verða um at taka upp samráðingar fyri at víðka deildirnar til eisini at umfata aðrar ser/undirdeildir. Hetta skal fara fram í tøttum samstarvi ímillum sjúkrahúsleiðsluna, deildarleiðslurnar og avvarðandi deildarleiðara.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til sjúkrahúsleiðsluna lokal nr. 251 ella 266. Umsókn við avriti av prógvum v.m. skal stílast til sjúkrahúsleiðsluna og sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn

Umsóknarfreist: 29. juni 2000, kl. 14.00.

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**

## Ph.D.-lestur í námsfrøði

Undirvísingar- og Mentamálastýrið bjóðar við hesum einum áhugaðum við útbúgving frá hægri lærustovni, sum undirvísir ella hevur undirvíst á miðnámsútbúgving ella hægri útbúgving, at søkja 3 ára Ph.D. lestrarstyrk í námsfrøði. Lesturin verður lagdur til rættis í samstarvi millum Undirvísingar- og Mentamálastýrið, Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Læraraskúla og Dansk Institut for Gymnasiepædagogik, Syddansk Universitet (Odense). Útbúgvingin kann byrja 1. august 2000.

Áhugað, sum hava í minsta lagi 3 ára undirvísingarroyndir í føstum starvi í miðnámsútbúgving ella hægri útbúgving eftir lokna námsfrøðiliga útbúgving, kunnu søkja um nevnda styrk. Styrkhavin fær 80% av grundlønini á tí lønarstigi, viðkomandi er á, umframt ískoyti til ferðaútreiðslur sambært nærri avtalu. Eftir lokna Ph.D.-útbúgving hevur styrkhavin rætt at venda aftur til starv sítt, men ætlanin er annars, at viðkomandi skal virka í føroysku útbúgvingarskipanini, soleiðis at útbúgvingin í størst møguligan mun kemur øllum útbúgvingarverkinum til gagns.

Styrkurin verður lýstur við serligum atliti at námsfrøðiligum menningarvirksemi innan útbúgvingarverkið sum heild ella innan miðnámsútbúgvingarnar og hægri skúlaskap í Føroyum, alt eftir hvør verkætlan, ið talan verður um. Fakligi karmurin skal vera rúmur og fevna um námsfrøði sum heild við føroyskum sum fakserstøkum evni.

Ph.D.-verkætlanin kann eitt nú fevna um:
a) ástøðiligar almennar námsfrøðiligar uppgávuorðingar við støði í tí serstøku málsligu støðu, sum føroyskir næmingar eru í og/ella
b) eina kanning av fakligum og námsfrøðiligum eyðkennum við atliti at føroyskum sum lærugrein í føroyska skúlaverkinum og/ella
c) ætlanir um, hvussu fakligt og námsfrøðiligt virksemi við atliti serstakliga at lærugreinini føroyskum kann mennast innan útbúgvingarnar í Føroyum.

Umsókn skal fevna um eina fyribils lýsing av verkætlanini (umleið 2–3 A4 síður), CV umframt próvskjøl, herundir prógv fyri lidna námsfrøðiliga útbúgving. Vísindaligar greinir v.m., sum umsøkjarin ynskir tiknar við í metingina, verða hjálagdar. Umsókn skal vera Undirvísingar- og Mentamálastýrinum í hendi í seinasta lagi 19. juni í ár.

Umsóknin verður viðgjørd av metingarnevnd, og játtan av umsókn er treytað av viðmæli frá Granskingarráðnum og góðkenning frá játtandi myndugleikum. Áhugað eru vælkomin at venda sær til Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra, í Undirvísingar- og Mentamálstýrinum, telefonnr. 35 50 50 fyri at fáa fleiri upplýsingar um ætlanina.

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
Postrúm 3279 • 110 Tórshavn
Telefon 355050 • t-postur: umms@umms.fo

## Tilboð til lesandi føroyingar í náttúruvísindi

**Jarðevnafrøði: Tungmetal í atmosferuni í Føroyum**
Í sambandi við eina millumtjóða verkætlan verða kanningar í løtuni gjørdar av mongdini av kyksilvur, sum er flutt við luftini til Føroya. Ein lesandi føroyingur hevur møguleika at luttaka í verkætlanini sum partur av útbúgving síni í evnafrøði, jarðevnafrøði ella aðrari viðkomandi útbúgving, har arbeiðið og úrslit kunnu vera partur av eini høvuðsritgerð. Viðkomandi skal luttaka í viðgerðini av tiknu royndunum á starvstovu í Bern í Sveits. Stuðulsmøguleikar til uppihaldið fylgja galdandi reglum hjá Stuðulsstovninum og Statens Uddannelsesstøtte.

Áhugað kunnu senda eina skrivliga umsókn til Mariu Dam, Heilsufrøðiligu Starvsstovu, Debesartrøð, FO-100 Tórshavn, innan 15. juni 2000.

Fleiri upplýsingar um verkætlanina og møguleikar fyri at luttaka kunnu fáast við skrivliga at venda sær til Mariu Dam, Heilsufrøðiligu Starvsstovu: mariadam@hfs.fo

**Jarðfrøði: Jarðfrøðilig havrannsóknarferð kring Føroyar**
Hollendska havrannsóknarskipið Pelagia fer í summar í døgunum frá 14. august til 1. september undir havrannsóknir í føroyskum sjóøki, har seismiskar kanningar verða gjørdar tvørtur um Hetlandsrennuna, umframt ymisk onnur sløg av botnkanningum. Í hesum sambandi hevur ein føroyskur lesandi í jarðfrøði ella aðrari viðkomandi útbúgving, møguleika at luttaka á ferðini sum part av útbúgving síni.

Áhugað kunnu senda eina skrivliga umsókn til Lis Mortensen, Jarðfrøðisavnið, Brekkutún 1, Postboks 3169, FO-110 Tórshavn, innan 15. juni 2000.

Fleiri upplýsingar um verkætlanina og møguleikar fyri at luttaka kunnu fáast við skrivliga at venda sær til Lis Mortensen, Jarðfrøðisavnið: lismor@ngs.fo

## Sjúkraavloysari fyri skúlatænara

Søkt verður eftir sjúkraavloysara til Tvøroyrar skúla í umleið 2 mánaðir at byrja beinanvegin.

Nærri fæst at vita við at venda sær til kommunuskrivstovuna á tlf. 371085 og tosa við býráðsskrivaran.

**Tvøroyrar Kommuna**